NÁM

# HEIMSMÁLINI Á FILMI

HEIMSMÁL
fyri burðardyggari menning

## FILMSKAPPING
*fyri hádeild og miðnám*

## VINNINGUR
**30.000 kr**

### *Til næmingin*

Við 30.000 krónum í vinningi skipar Nám aftur í ár fyri filmskapping fyri hádeild og miðnám um heimsmálini hjá ST. Hesaferð er yvirskipaða evnið heimsmál 3: "Góð heilsa og vælferð - tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri."

Tá heimsheilsustovnurin WHO allýsir heilsu, verður víst til kropsligan, sálarligan og sosialan trivnað. At hava góða sálarheilsu verður lýst sum ein støða, ið er merkt av trivnaði, har tann einstaki brúkar evni og førleikar, klárar at meistra vanligu avbjóðingarnar, sum eru í lívinum, arbeiðir ella virkar, so tað gevur úrslit, og klárar at geva nakað til samfelagið ella felagsskapin.

Hóast sálarheilsa og trivnaður fylla nógv bæði globalt og lokalt, verður lítið nomið við hetta í teimum 17 heimsmálunum. Júst tí, velur Nám, at filmarnir, sum luttaka í filmskappingini í ár, skulu viðgera hugtøkini trivnaður og sálarheilsa.

Við filminum kunnu tit vísa, hvussu tit lýsa trivnað anno 2021, tit kunnu vísa, hvørji samfelagslig og menniskjanslig viðurskifti, tit halda, kunnu ávirka trivnað, og um nøkur av hesum eiga at verða broytt fyri at skapa betri karmar fyri trivnaði og góðari sálarheilsu.

Longdin á lidna filminum skal í mesta lagi vera 7 minuttir. Frásøgumátin er upp til tykkara.
Tit kunnu gera filmin sum heimildarfilm, listafilm ella annað slag av filmi, sum tit gera av, bara hann heldur seg til evnið og endamálið.
Tala í filminum skal vera á føroyskum, og tað kann vera ein fyrimunur at skriva undirtekst.

Allir næmingar í hádeild og miðnámi í landinum kunnu melda seg til kappingina hjá Námi. Mælt verður til, at flokkurin arbeiðir saman.
Hetta kann til dømis vera ein verkætlanaruppgáva, har filmurin er úrslitið. Lærarin, sum hevur flokkin, skal góðkenna filmin.

Tosa ella spæla næmingar sjálvir í filminum, skal loyvi gevast frá foreldrum ella verja.
Lidni filmurin skal kunna brúkast til undirvísing, sum hann er. Filmurin skal hava innihaldsliga tyngd og vera tekniskt í lagi, samstundis sum hann skal hava eina fjøltáttaða tilgongd at lýsa evnið. Upptøkurnar skulu vera tykkara egnu og ikki læntar frá øðrum.

Ein dómsnevnd verður sett at meta um innkomnu filmarnar. Dómsnevndin tilskilar sær rætt at velja frítt millum innkomnu filmarnar.
Freistin at lata lidna filmin inn er 23. novembur 2021, og hann skal sendast um www.filemail.com til: filmskapping@nam.fo

7.. desembur 2021 kl. 19.00 verður eitt úrval av innkomnu filmunum víst í Havnar Bio.
Flokkarnir, ið hava gjørt innkomnu filmarnar, verða bodnir til sýningina og fáa ókeypis kola og poppkorn.
Vinnarin verður kunngjørdur sama kvøld. Filmarnir skulu í minsta lagi vera filmaðir í Full HD 1080p.



Export format:
QuickTime
Preset: Match Source - High bitrate
Codec: H.264



NÁM

# HEIMSMÁLINI Á FILMI

HEIMSMÁL
fyri burðardyggari menning

## *Til læraran*

Aftur í ár skipar Nám fyri filmskapping við støði í Heimsmálunum hjá ST. Vinningurin er 30.000 kr. Hesaferð skulu luttakandi filmar lýsa Heimsmál 3 "Góð heilsa og vælferð - tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri."

### Evnið:

Tá heimsheilsustovnurin WHO allýsir heilsu, verður víst til kropsligan, sálarligan og sosialan trivnað. At hava góða sálarheilsu verður lýst sum ein støða, ið er merkt av trivnaði, har tann einstaki brúkar evni og førleikar, klárar at meistra vanligu avbjóðingarnar, sum eru í lívinum, arbeiðir ella virkar, so tað gevur úrslit, og klárar at geva nakað til samfelagið ella felagsskapin.

Hóast sálarheilsa og trivnaður fylla nógv bæði globalt og lokalt, verður lítið nomið við hetta í teimum 17 heimsmálunum. Júst tí, velur Nám, at filmarnir, sum luttaka í filmskappingini í ár, skulu viðgera hugtøkini trivnaður og sálarheilsa.

Við filminum kunnu tit vísa, hvussu tit lýsa trivnað anno 2021, tit kunnu vísa, hvørji samfelagslig og menniskjanslig viðurskifti, tit halda, kunnu ávirka trivnað, og um nøkur av hesum eiga at verða broytt fyri at skapa betri karmar fyri trivnaði og góðari sálarheilsu.

### Dagar at minnast til:

23. novembur 2021 skal lidni filmurin sendast Námi. Filmurin verður sendur um www.wetransfer.com til filmskapping@nam.fo.

7.. desembur 2021 kl. 19.00 verður eitt úrval av innkomnu filmunum víst í Havnar Bio.
Flokkarnir, ið hava gjørt innkomnu filmarnar, verða bodnir til sýningina og fáa ókeypis kola og poppkorn.

### Um filmin:

Filmarnir skulu í minsta lagi vera filmaðir í Full HD, og formatini eru nágreinað niðast í lýsingini til næmingin.
Filmurin verður eisini lagdur á temasíðuna um heimsmálini, sum er á www.snar.fo

Filmurin um heimsmálini skal vera stuttur - í mesta lagi 7 minuttir. Filmurin skal vera klárur at brúka til endamálið, sum er at upplýsa um heimsmálini. Minnist til, at tosa ella spæla næmingarnir sjálvir í filminum, skal loyvi gevast frá foreldrum ella verja, um næmingarnir ikki eru myndugir.

Filmurin verður gjørdur sum partur av undirvísingini undir leiðslu av læraranum, sum hevur flokkin. Mælt verður til, at flokkurin arbeiðir saman. Hetta kann til dømis vera ein verkætlanaruppgáva, har filmurin er úrslitið.



Eru spurningar ber til at spyrja seg fyri á:
filmskapping@nam.fo

